(D) og Gerald Ford (R) (seinni forseti), umframt Allen Dulles og John McCloy.

Heilt frá byrjan varð funnist at arbeiðinum hjá nevndini. Talan var tó um kritikk í tí smáa og frá einstøkum persónum, eitt nú frá sakføraranum Mark Lane, sum tíðliga í tilgongdini av móðir Lee Harvey Oswald, Marguerite, varð settur sum verji fyri sonin. Men hetta var trupult, tí Warren-nevndin vildi ikki heilt góðtaka ein velja til Oswald.

Mark Lane illtonkti Warren-nevndina at vera partíska, og tá FBI kunngjørdi sína fyribils niðurstøðu av morðinum 9. desember 1963, fall illgrunin beinanvegin á, at Warren-nevndin fór at koma við somu niðurstøðu. Og so varð.

24. september 1964 handaði Warren-nevndin frágreiðingina, sum umframt sjálva frágreiðingina eisini fylti 26 fylgibind við vitnisfrágreiðingum og optiskum prógvum, Johnson forseta úrslitið. Tríggjar dagar seinni, 27. september, varð frágreiðingin so almannakunngjørd – nakað, sum nevndin sjálv ongantíð ætlaði.

Tað lætnaði fyri ondini hjá amerikanska fólkinum, tá frágreiðingin kom, tí nú høvdu tey sjón fyri søgn, at har var hvørki Sovjetsamveldið, Castro ella nøkur samansvørjing aftanfyri – bara »a lone nut«.

Men júst tað, at frágreiðingin varð almannakunngjørd, førdi við sær, at til bar hjá teimum ivasomu at nærlesa hana. Og tað stóð skjótt greitt, at tað í fleiri førum lak millum teori og praksis. Bøkur byrjaðu at koma undan kavi, har funnist var harðliga at Warren-frágreiðingini. Og ein teirra var »Rush to Judgement«, hjá júst Mark Lane. Hetta var ikki hin fyrsta bókin at finnast at Warren-nevndini, men hetta var hin nógv týdningarmesta bókin so tíðliga í tilgongdini. Og hon vendi meiningini hjá amerikanska fólkinum á høvdið. Frá at hava litið blint á tað, myndugleikarnir søgdu, vendi opiniónin sær nú móti teimum.

Og líka síðani hevur meirilutin av amerikanarum meint, at ein samansvørjing stóð aftan fyri morðið á Kennedy. Teir ivast eisini stórliga í, um Lee Harvey Oswald yvirhøvur hevði nakað við morðið at gera.



*Jacob Rubenstein, vanliga nevndur Jack Ruby, myrdi Lee Harvey Oswald fyri opnum skíggja. Lee Harvey Oswald varð handtikin, mistonktur fyri morðið á Kennedy forseta. Morðið varð framt, tá Oswald bleiv fluttur frá varðhaldinum á løgreglustøðini í Dallas til statsfongslið. Ein hending, sum bleiv varpað beinleiðis í amerikanskum sjónvarpi*

Warren-nevndin hevði stórar trupulleikar at plasera Oswald á sættu hædd á Texas Schoolbook Depository Building (TSDB), sum í dag stendur á sama stað á horninum av Houston/Elm street, og nú er innrættaður sum eitt savn.

Nevndin hevði eisini stórar trupulleikar av, at flestu vitnini hoyrdu skot frá garðinum uppi í lítlu brekkuna til høgru og framman fyri forsetabilin. Lítli skráningurin hevur síðani borið heitið »the Grassy Knoll« eftir at eitt av vitnunum greiddi soleiðis frá staðnum.

Kennedy-morðið er í mangar mátar serstakt, ikki minst tí, at í minsta lagi trý fólk tóku morðið upp á film. Kendasti og klárasti filmurin er tann hjá møbilframleiðaranum, Abraham Zapruter, sum týðiliga vísir morðið, tó burtursæð frá fáum sekundum, har forsetabilurin er goymdur aftan eitt vegskelti.

Týðiligt er tó, at Kennedy er raktur, tá hann kemur undan skeltinum, og síðani sæst skakandi, drepandi skotið, tá høvdið á forsetanum eksploderar, meðan tað verður slongt aftureftir og til vinstru.

Øll vanlig fólk tulka hetta sum reaktiónin upp á eitt skot framman ífrá og frá høgru, men Warren-nevndin valdi ikki at gera nakað við tann trupulleikan, tí tað var ongantíð roknað við, at filmsklippið av Zapruter-filminum fór at náa almenninginum.

Seinni hava viðhaldsmenn hjá Warren-frágreiðingini teoriserað um eina sonevnda jet-effekt, har teir hava skotið skjóttgangandi riflukúlur í eina melón, sum síðani dettur fram móti skjúttanum. Sama er roynt við einum geitahøvdi.

Men, sum konspiratorar seinni hava víst á, so var Kennedy hvørki ein melón ella ein deyð geit.

Somuleiðis hava Warren-fjepparar ongantíð megnað at greitt frá, hví – um jet-effektin virkaði – høvdið á Kennedy varð tveitt eftur eftir og til *vinstru*, tá eitt skot frá TSDB skuldi tveitt høvdið aftur eftir og til *høgru*.

Mest kontroversiella niðurstøðan hjá Warren-nevndini var kortini sonevnda »single-bullet« teoriin, sum Arlen Specter – nú republikanskur senatorur fyri Pennsylvania – fann upp á.

Fyri at fáa prógvini at passa til ein einsamallan skjútta, mátti eina av teimum trimum kúlunum, sum Warren-nevndin gjørdi av var talið av skotnum kúlum, fara inn gjøgnum nakkan á Kennedy, út gjøgnum hálsin, inn í ryggin á Connally, bróta tvey rivjabein, út beint undir høgra bróstvorta, gjøgnum høgru hond, har hon breyt fleiri bein, fyri síðani at enda í vinstra læri (nakað, sum Oliver Stone gjørdi nógv burtur úr í filminum, *JFK*).

Seinni skal hendan kúlan verða dottin úr sárinum í lærinum og funnin av einum húsavøri á Parkland Memorial Hospital – púra óskadd.

Ei undur í, at hon verður nevnd »The Magic Bullet«.

---

*»History and posterity must decide. Customarily they reserve he mantle of greatness for those who win great wars, not those who prevent them. But in my unobjective view I think it will be difficult to measure John Kenndy by any ordinary historical yardstick. For he was an extraordinary man, an extraordinary politician and an extraordinary President. Just as no chart on history of weapons could accurately reflect the advent of the atom, so it is my belief that no scale of good and bad presidents can rate John Fitzgerald Kennedy. A mind so free of fear and myth and prejudice, so opposed to cant and chlicés, so unwilling to feign or be fooled, to accept or reflect mediocrity, is rare in our world – and even rarer in American Politics. Without demeaning any of the great men who have helped the precidency in this country, I do not see how John Kennedy could be ranked below any one of them... He was a big man – much bigger than anyone thought – and all of us are better for having lived in the days of Kennedy«*

Theodore Sorenson (røðuskrivari hjá Kennedy (av danskari ætt))

Sosialurin